Kappingareftirlitið

# MATVØRUPRÍSIR Í FØROYUM

Eru altjóða kreppur, kríggj og politiskar ósemjur millum lond einasta atvoldin til høgu matvøruprísirnar í Føroyum, ella elvir dult vinningsbrell hjá matvøruvinnuni eisini til prísvøksturin?



**Kappingareftirlitið er farið undir eina størri kanning av marknaðinum fyri húsarhaldsvørur í Føroyum. Innleiðandi er gjørd lýsing av, hvørjar møguligar grundir eru til tann prísvøkstur, sum hevur verið á føroyskum matvørum.**

**Við hesi greinini vil Kappingareftirlitið geva almenninginum innlit í lýsingarnar.**

**Fyrivarni skal takast fyri, at talan er um ábendingar og ikki endaligar niðurstøður.**

**Í greinini eru ábendingar um, at vit skulu út um landoddarnar fyri at finna grundir til stóru príshækkingarnar, sum byrjaðu í 2022. Tó verður staðfest, at vinningsførið hjá matvøruvinnuni er vaksið, men at hetta hendi longu í 2014 - 2015 eftir eitt styttri tíðarskeið við óvanliga lakum vinningsføri. Tí er ongin ábending um, at matvøruvinnan í Føroyum hækkaði sín egna vinning av matvørum í sambandi við koronufarsóttina í 2020 ella kríggið í Ukraina í 2022.**

## 1. Prísurin á matvørum

Seinastu árini eru prísirnir á matvørum hækkaðir so skjótt, sum vit ikki hava upplivað í nýggjari tíð. Í sama tíðarskeiði hava vit havt heimsumfatandi kreppur, kríggj og politiskar ósemjur millum lond.

Spurningurin er tí, um alt hetta rumblið er atvoldin til vaksandi matvøruprísirnar í Føroyum, ella um matvøruhandlarnir brúka órógvið úti í heimi til at fjala út yvir egið brell eftir meira vinningi.

Eins og her heima hevur stór ónøgd verið í grannalondunum um matvøruprísirnar, og kappingarmyndugleikarnir har hava gjørt ymsar kanningar, sum heilt ella lutvíst fevna um hetta økið.

Norski kappingarmyndugleikin hevur síðani 2019 kannað norska húsarhaldsvørumarknaðin. Tilsamans eru seks kanningar av viðurskiftum innan fyri sølu av húsarhaldsvørum.[1,2,3,4,5,6] Evnini hava eitt nú verið innkeypstreytir, staðseting av sølustøðum, útbreiðsla av prísalgoritmum, lønsemi og markinntøka á vørum.

Viðvíkjandi lønsemi og vinningi var niðurstøðan, at ongar ábendingar vóru um, at vinnan hevði gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við príshækkingarnar í kjalarvørrinum á koronufarsóttini, og sum hildu fram tá Russland gjørdi innrás í Ukraina. Myndugleikin metti tó, at prísstigið í Noregi var hægri enn á einum virknum marknaði, og at tað var miðsavning og atgongd til marknaðin, sum var orsøkin.

Danski kappingarmyndugleikin hevur ikki gjørt nakrar kanningar av danska matvørumarknaðinum seinastu mongu árini, men í 2024 varð ein grein givin út um prísstigið í Danmark, har prísstigið á húsarhaldsvørum eisini var partur.[7]

Í greinini verður staðfest, at um korrigerað verður fyri meirvirðisgjaldi, avgjøldum og vælferðarstigi, eru donsku prísirnir 15% hægri enn í samanberandi londum í Evropa.[8] Í greinini verður tó staðfest, at tað serliga eru prísirnir á tænastum, sum er orsøkin til prísmunin. Tænastur í Danmark eru umleið 26% dýrari enn í samanberiligu londunum. Um vørur verður sagt, at prísirnir eru á sama stigi sum í londunum í samanberingini, og at matvøruprísirnir hava verið lægri enn í londunum í samanberingini síðani 2018. Hetta er øvugt av tí, ið higartil hevur verið hildið, men eldri samanberingar hava ikki tikið atlit at tilboðsprísum.

Svenski kappingarmyndugleikin kannaði svenska matvørumarknaðin árini 2023 og 2024. Í frágreiðingini,[9] ið fevndi um tíðarskeiðið 2021 til 2023, varð staðfest, at príshækkingar vóru í allari virðisketuni, men størst í matvøruframleiðsluni. Umleið 70% av øllum príshækkingum byrjaðu í framleiðsluliðnum, meðan 30% vóru í smásøluliðnum. Um smásøluliðið varð sagt, at tað økti ella helt fast um eina markinntøku, sum var størri enn tað, ið kundi rættvísgerast av hægri kostnaði. Millum annað varð staðfest, at smásøluliðið helt fast um eitt prísstig, hóast rávøruprísirnir fullu.

Niðurstøðan hjá svenska kappingarmyndugleikanum var, at ein virkin kapping uttan iva hevði kunnað avmarkað tær príshækkingar, sum vóru í tíðarskeiðinum.

## 2. Prísvøksturin í Føroyum

Eisini í Føroyum er stór ónøgd um prísstigið og serliga um tær príshækkingar, sum hava verið á matvørum.

Matvørur eru nógv dýrkaðar seinastu árini. Á ritmynd 2.1 niðanfyri er brúkaraprístal fyri mat- og drykkjuvørur fyri árini 2001 til 2024.

[1] Konkurransetilsynet, 2019, Kartlegging av inkjøpsbetingelser i norsk dagligvaresektor

[2] Konkurransetilsynet, 2020, Kartlegging av inkjøpsbetingelser i norsk dagligvaresektor

[3] Konkurransetilsynet , 2021, Hvilken effekt kan algoritmer ha på konkurransen

[4] Konkurransetilsynet, 2022, Konkurransetilsynets dagligvarerapport

[5] Konkurransetilsynet, 2023, Konkurransetilsynets dagligvarerapport

[6] Konkurransetilsynet, 2024,Marginestudie, del 1 & 2

[7] Konkurrence- og forbrugerstyrelsen, 2022, Prisniveauet i Danmark

[8] Danmark, Finland, Frakland, Italien, Belgien, Týskland og Niðurlond

[9] Konkurrensverket, 2024, Stigande matpriser – vart tar pengarna vägen?

Bláa strikan vísir gongdina á prístalinum, meðan grønu stabbarnir vísa prísbroytingina hvønn ársfjórðing.

**Ritmynd 2.1.** Brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur hvønn ársfjórðing 2001-2024
Støðisár = 2001




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Ritmynd 2.1 vísir, at matvøruprísirnir eru hækkaðir við 62% síðani 2001. Tíðarskeiðið kann býtast í trý. Frá 2001 til 2009 hækkaðu matvøruprísirnir við 22,2%, ið svarar til ein árligan prísvøkstur upp á 2,5%. Evropeiski miðbankin miðar eftir einari inflation upp á 2%, og tí er slíkur prísvøkstur innan fyri tað vanliga.[10]

**Kassi 1. Brúkaraprístal og Vísitøl**

Vísitøl (index-tøl) vísa gongdina á tølum yvir tíð. Vísitøl hava altíð eitt støðisár. Vísitalið fyri virðið í støðisárinum verður sett til 100. Vísitalið á øðrum árum verður roknað í mun til virðið á støðisári. Er vísitalið fyri ávíst ár t.d. 120, so merkir hetta, at virðið fyri hetta árið er 20% hægri enn virðið fyri støðisárið. Er talið 90, so er virðið fyri hetta árið 10% lægri enn støðisárið. Um ein samanber tvey ár, har annað ikki er støðisárið, so er munurin í prosentstigum.
Brúkaraprístalið er eitt vísital, ið vísir prísvøkstur í samfelagnum. Brúkaraprístalið inniheldur prístøl fyri vøru- og tænastubólkar. Í hesi grein er brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur brúkt.

Frá 2009 til 2022 var eitt tíðarskeið við sera støðugum matvøruprísum. Matvøruprísirnir hækkaðu við 11,67% hetta tíðarskeiðið, ið svarar til 0,85% árliga. Hetta er ein óvanliga lágur prísvøkstur, um hugt verður aftur í tíð.

Í triðja tíðarskeiðinum, sum gongur frá ársbyrjan 2022 til í dag, eru prísirnir á matvørum hækkaðir við 22,1%, ið svarar til 7,5% árliga. Slíkur prísvøkstur hevur ikki verið at sæð í nýggjari tíð. Ikki er tað løgið, at føroyski brúkarin er ørkymlaður um matvøruprísirnar, tí samlaða príshækkingin seinastu sløku trý árini hevur verið tvífalt so stór, sum samlaða príshækkingin var frá 2009 til 2022.

## 3. Innflutningur

Ein stórur partur av matvørunum, ið verða seldar í Føroyum, eru innfluttar. Tískil eru góðar grundir til at hyggja at broytingunum í innflutningsprísunum fyri at vita, um tær spegla tær prísbroytingar, ið vit síggja í keypsprísinum hjá føroyska brúkaranum. Er samanhangur millum innflutningsprísin og søluprísin á vørunum, kann orsøkin til prísbroytingarnar liggja uttan fyri landoddarnar heilt ella lutvíst.

Á ritmynd 3.1 niðanfyri er samanbering millum brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur, innflutningsprísin á matvørum samlað, umframt á útvaldum matvørubólkum. Hesir vørubólkar eru valdir, tí tað eru teir tríggir vørubólkarnir, ið innflutt

**Ritmynd 3.1.** Vísital fyri kiloprísinum á innflutningi og brúkaraprístali fyri mat og drykkjuvørur frá 2009 til 2024
Støðisár = 2009




*Kelda: Hagstova Føroya, Kappingareftirlitið.*
**Fisk, skeljadjór, lindýr og vørur úr hesum er ikki við*

[10]https://www.ecb.europa.eu/ecb/orga/tasks/monpol/html/index.en.html

verður mest av, bæði í nøgd og virði í tíðarskeiðinum 2009-2024.

**Kassi 2. Um vørubólkarnir**

Teir tríggir vørubólkarnir eru “Kjøt og kjøtvørur”, “Frukt og grønmeti” og “Korn og kornvørur”.

Vørubólkarnir fevna eisini um rávørur til víðariframleiðslu til matvørur og djórafóður, men talan er um avmarkar nøgdir í mun til samlaða innflutningin í bólkinum. Tí ávirkar prísurin á rávørunum ikki samlaða innkeypsprísin í nakran mun.

Vørubólkurin “Fiskur, skeljadjór, lindýr og vørur úr hesum” er ikki tikin við, tí mett verður, at ein ov stórur partur av hesum tølum ikki mynda tað, sum verður selt í matvøruhandlum í Føroyum, og tískil hevði tað ikki givið eina rættvísa mynd, um vørubólkurin varð tikin við.

Ritmynd 3.1 vísir, at innflutningsprísirnir í tíðarskeiðinum fyri tað mesta eru hækkaðir meira enn brúkaraprístalið. Við einum vøkstri upp á 88,9% eru tað serliga innflutningsprísirnir á frukt og grønmeti, sum eru vaksnir nógv, meðan innflutningsprísirnir á kjøti og kjøtvørum og korni og kornvørum eru hækkaðir ávikavist 60,8% og 43,0%. Samlaði kiloprísurin á innflutningi er í tíðarskeiðinum hækkaður við 69,3%, og tí er kostnaðurin fyri at innflyta matvøru vaksin munandi meira enn prísurin á mati og drykkjuvørum í Føroyum, sum er hækkaður 38,8% í tíðarskeiðinum.

Hyggja vit nærri at teimum seinastu árunum, síggja vit á ritmynd 3.2, at prísurin á innflutninginum - eftir eitt fall í 2021 fyri onkran vørubólk – veksur við stórari ferð og er hækkaður millum 24,6% og 27,6% í tíðarskeiðinum. Hetta svarar til ein árligan vøkstur millum 5,7% og 6,3%. Brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur liggur á sama stigi, sum teir tríggir útvaldu vørubólkarnir og oman fyri innflutningsprísin til 2024, tá innflutningsprísurin verður hægri fyri tíðarskeiðið. Brúkaraprístalið hevur ein høgan vøkstur upp á 25,4 %, sum gevur ein miðal árligan prísvøkstur upp á 5,8%. Tann stóri vøksturin í brúkaraprísinum byrjar tó ikki fyrr enn í 2022, tá vøksturin er 24,7% og árligi vøksturin 7,6%.

**Ritmynd 3.2.** Vísital fyri kiloprísin á innflutningi og brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur frá 2020 til 2024
Støðisár = 2020




*Kelda: Hagstova Føroya, Kappingareftirlitið.*
**Fiskur, skeljadjór, lindýr og vørur úr hesum er ikki við*

Samanumtikið kann sigast, at brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur ikki er vaksið líka nógv sum vísitølini fyri innflutningin av matvørum í tíðarskeiðinum 2009 til 2023. Verður støðið tikið í 2020, so er brúkaraprístalið fyri matvørur og drykkjuvørur vaksið líka so nógv sum innflutningurin av matvørum til og við 2023.

Tað, at prísurin á matvøruinnflutningi er hækkaður munandi bæði síðani 2009 og síðani 2020, er tekin um, at prísurin hækkar, áðrenn vørurnar verða keyptar til Føroya, og tí eru ábendingar um, at orsøkin til prísvøksturin á matvørum seinastu árini heilt ella partvíst liggur uttan fyri landoddarnar.

## 4. Tøka inntøkan

Her fara vit at hyggja eftir, hvussu broytingarnar í prísvøkstrinum og tøku inntøkuni hjá føroyingum eru. Hóast vit síggja ábendingar um, at vøksturin í stóran mun kemur uttanífrá, er vert at kanna hvussu hesin prísvøksturin merkist hjá brúkaranum.

Á ritmynd 4.1 niðanfyri er samanbering millum gongdina á brúkaraprístalinum (bláa strikan) og vísitøl fyri tøka inntøku. Grøna strikan lýsir gongdina á tøku inntøkuni hjá teimum við lægstu tøku inntøkuni, myrkamorreyða strikan lýsir gongdina hjá teimum við hægstu tøku inntøkuni, og ljósareyða strikan lýsir gongdina á miðvirðinum fyri tøka inntøku. Tøl fyri tøku inntøkuna eru bert fram til 2022. Tí er ein brotastrika við, sum vísir hvat vøksturin hevur verið, um hann fylgdi gongdini í tíðarskeiðinum. Brotstrikan fyri 2023 og 2024 skal takast við fyrivarni, tí hon er bert ein meting út frá gongdini á teimum tølum, sum vit hava um tøka inntøku, og tí eru seinastu lønarsamráðingar og aðrar ávirkanir á inntøkuna ikki beinleiðis tiknar við. Lutfalsligu stóru lønarhækkingarnar í seinastuni, umframt skattalætti, merkir tí at hendan brotstrikan helst er eitt vet undirmett.

**Ritmynd 4.1.** Vísitøl fyri tøka inntøku og brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur 2009 til 2024
Støðisár = 2009




*Kelda: Hagstova Føroya, Kappingareftirlitið.*

**Kassi 3. Tøka inntøkan og onnur hugtøk**

**Tøka inntøkan** er inntøkan hjá tí einstaka eftir skatt og onnur lógarkravd gjøld.

**Miðvirði** er tann mittasta tøka inntøkan av øllum tøkum inntøkum í Føroyum (median)

**Miðal tøka inntøkan hjá fimtinginum við hægst tøkari inntøku** er miðal fyri tey 20% við hægst tøkari inntøku.

**Miðal tøka inntøkan hjá fimtinginum við lægst tøkari inntøku** er miðal fyri tey 20% við lægst tøkari inntøku.

Vit síggja í ritmynd 4.1 omanfyri, at í tíðarskeiðinum frá 2009 er eitt lítið fall í inntøkunum hjá teimum lægst løntu, men síðani 2013 liggur tøka inntøkan fyri teir inntøkubólkar, ið vit hyggja at, hægri enn vøksturin í brúkaraprístalinum samanborið við útgangsstøðið í 2009. Frá 2022 sæst, at brúkaraprístalið ger eitt stórt lop, sum tekur ein stóran part aftur av tí, sum er vunnið í inntøku í tíðarskeiðinum.

Tá vit so hyggja nærri at hesum seinastu árunum á ritmynd 4.2, sæst, at vøksturin í tøku inntøkuni fyri allar inntøkubólkar verður tikin aftur av prísvøkstrinum. Flestu inntøkubólkar fáa munandi minni fyri inntøkuna í dag enn fyri bert sløkum trimum árum síðani, um vit vænta, at inntøkuvøksturin er hin sami. Um vit hugsa, at inntøkuvøksturin í 2023 og 2024 er støðugur í hesum tíðarskeiði, síggja vit, at miðvirði fyri tøka inntøku er hækkað umleið 7 prosentstig minni enn brúkaraprístalið. Tær heilt lágu inntøkurnar vísa seg enn at vaksa meira, meðan tær høgu inntøkurnar vaksa eitt vet minni enn miðvirðið fyri tøku inntøkuna.

**Ritmynd 4.2.** Vísitøl fyri tøka inntøku og brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur 2018 til 2024
Støðisár = 2018




*Kelda: Hagstova Føroya, Kappingareftirlitið.*

## 5. Nýtslumynstrið

At tøka inntøkan er støðugt vaksin í tíðarskeiðinum, samstundis sum tað hava verið long tíðarskeið við lítlum og støðugum prísvøkstri, kann hava havt eina ávirkan á nýtslumynstrið. Økt vælferð gevur brúkarum størri rásarúm til nýtslu og uppsparing.

Á ritmynd 5.1 niðanfyri er smásøluvísital fyri sølu av blandaðum úrvali, ið m.a. fevnir um sølu av gerandisvørum í matvøruhandlum. Grøna linjan er smásøluvísitalið í føstum prísum. Bláa linjan er eitt tilgjørt vísital, sum Kappingareftirlitið hevur gjørt, ið vísir sama vísital, men sum er korrigerað fyri fólkavøkstur.

**Ritmynd 5.1.** Vísital fyri smásølu við blandaðum úrvali, har dentur er lagdur á mat-, drykkju- og tubbaksvørur.

Støðisár = 2015




*Kelda: Hagstova Føroya, Kappingareftirlitið.*

Sum sæst á grønu strikuni omanfyri, var sølan av gerandisvørum í føstum prísum støðug fram til 2014. Síðani vaks sølan nógv fram til og við 2021. Eftir hetta minkar sølan munandi, men tó ikki niður á stigið áðrenn 2014.

Í hesum tíðarskeiði hevur eisini stórur fólkavøkstur verið, og hann kann í ávísan mun hava elvt til hækkingina í vísitalinum. Kappingareftirlitið hevur tí korrigerað vísitalið fyri fólkavøkstur, og tað er tann bláa strikan í ritmyndini. Vísitalið, har ávirkanin av fólkavøkstrinum er tikin burturúr, hækkar framvegis frá 2014 og fram til 2021. Hesin parturin av vøkstrinum gevur ábending um, at nýtslan hjá brúkarunum broytist í hesum tíðarskeiði. Brúkarin keypir fleiri og møguliga dýrari vørur. Hendan gongdin er um at venda aftur, men brúkarin er framvegis ikki farin aftur til sínar keypsvanar áðrenn 2014. Hetta hóast tær stóru príshækkingarnar síðani 2022 hava tikið vøksturin í tøku inntøkunum síðani 2011, aftur.

Ábendingar eru um, at tíðarskeiðið frá 2009 til 2021 við lágum prísvøkstri og støðugt øktum inntøkum hevur broytt nýtsluvanarnar hjá brúkarunum. Um nýtsluvanarnir eru broyttir, tí brúkararnir hava valt dýrari vørur, ella tí veitararnir hava broytt vøruúrvalið til dýrara slagið, ber ikki til at siga nakað um. Tað er tó greitt, at brúkarin í løtuni stríðist orsaka av stóra og brátt íkomna prísvøkstrinum.

## 6. Hvaðan stavar prísvøksturin?

Spurningurin er, hvørji viðurskifti hava elvt til tær stóru hækkingarnar síðani 2022. Er talan um viðurskifti, sum liggja uttan fyri landoddarnar, ella er talan um viðurskifti í Føroyum, t.d. vantandi kapping í heil- ella smásølu, sum heilt ella partvís hava elvt til støðuna?

Ein royndur lutur er at samanbera prísgongdina á matvørum í Føroyum við prísgongdina í teimum londum, haðani vit keypa matvørurnar. Víkur prísgongdin í teimum londunum frá prísgongdini, sum vit hava her heima, er ábending um, at keldan til høgu príshækkingarnar er í Føroyum.

Umleið 1/3 av innflutninginum av matvørum til Føroya eru donsk framleiðsla og sløk 80% av innflutninginum kemur umvegis Danmark, og tí eru góðar grundir til at samanbera við Danmark.

Á ritmynd 6.1 niðanfyri er samanbering millum føroyska og danska prístalið fyri matvørur. Føroyska prístalið er ljósabláa linjan, danska prístalið er myrkamorreyða linjan. Munurin millum hesar er grøna økið, og myrkabláa økið er broytingin í muninum.

**Ritmynd 6.1.** Brúkaraprístalið fyri mat- og drykkjuvørur í Føroyum og Danmark hvønn ársfjórðing 2001-2024
Støðisár = 2001




*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik, Kappingareftirlitið.*
*Viðmerking: Egnar útrokningar*

Um støðið verður tikið í somu tíðarskeiðum, sum undir ritmynd 2.1, t.e. 2001 til 2009, 2009 til 2022 og 2022 til dags dato, sæst, at danska og føroyska brúkaraprístalið fylgjast rættiliga neyvt fram til 2009.

Í endanum av 2009 sær tað út til, at eitt príslop hendi í Danmark, tí munurin millum danska og føroyska brúkaraprístalið hækkar uppá nakrar fáar mánaðir við meira enn 5 prosentstigum.

Í tíðarskeiðinum 2009 til 2022 fylgjast prísirnir heilt. Donsku prísirnir gera aftur eitt lop uppeftir síðst í 2017 og fyrst í 2018. Munurin minkar aftur í 2019, tá føroysku prísirnir fóru upp.

Í tíðarskeiðinum frá 2022 og frameftir hækka bæði donsku og føroysku prísirnir aftur. Í sambandi við hækkingarnar í 2022 gjørdu donsku prísirnir eitt lop í mun til teir føroysku. Munurin bleiv útjavnaður, tí at teir føroysku prísirnir, nakað forskotið, gjørdu eitt tilsvarandi lop.

Tað er greitt, at samband er millum danska og føroyska brúkaraprístalið fyri mat, men tað er eisini greitt, at danska brúkaraprístalið hevur fleiri ferðir gjørt eitt lop í mun til tað føroyska brúkaraprístalið.

Hini londini, sum samanberingin verður gjørd við, eru Stórabretland, Noreg, Ísland, Svøríki og Týskland. Hesi londini, saman við Danmark, umboða umleið 75% av samlaðu framleiðsluni av matvørum sum vera innfluttar til Føroyar í tíðarskeiðinum.

Á ritmynd 6.2 niðanfyri eru samanberingar millum brúkaraprístølini fyri matvørur í Føroyum og omanfyrinevndu lond. Føroyska brúkaraprístalið er ljósabláa linjan, Danmark tann myrkamorreyða, Stórabretland tann blákollulitta, Svøríki tann gula, Týskland tann svarta, Ísland ljósareyða linjan og Noreg er grøna linjan.

**Ritmynd 6.2.** Samanbering av brúkaraprístali fyri matvørur fyri útvald lond 2009-2024
Støðisár = 2009




*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik, Statistisk Sentralbyrå, Hagstofa Íslands, Statistisches Bundesamt, Statestikmyndigheten, Office for National Statistics, Kappingareftirlitið.*

Yvirskipað kann sigast, at príshækkingarnar í samanberingarlondunum hava antin verið umleið sum í Føroyum ella hægri.

Her sæst, at Danmark, Noreg og Føroyar hava næstan eins prísstøðisbroytingar, har Føroyar enda eitt sindur lægri eftir tíðarskeiðið. Svøríki og Týskland hava eisini sama rák, men leggja seg eitt vet hægri. Í Stórabretlandi liggur prísvøksturin frá 2009 til 2014 á einum eitt sindur hægri stigi, sum m.a. kann koma av, at bretska gjaldoyrað viknaði í hesum tíðarskeiðinum, samstundis sum meirvirðisgjaldið hækkaði 2,5 prosentstig. Tó fylgir vøksturin í Stórabretlandi væl hinum tjóðunum árini eftir. Ísland harafturímóti víkir munandi frá við einum prísvøkstri upp á umleið 84,8% seinastu 15 árini.

Greiningin omanfyri gevur ábendingar um, at tað eru ymisk viðurskifti uttan fyri landoddarnar, sum hava elvt til príshækkingarnar í Føroyum. Um tað vóru innanlandsviðurskifti, hevði føroyska prístalið fyri matvørur víkt frá tí gongdini, sum er í londunum í samanberingini.

Títtu og ógvusligu príshækkingarnar, sum byrjaðu nakað inni í koronufarsóttini, og sum hava verið afturvendandi síðani, hava elvt til serliga misnøgd.

Á ritmynd 6.3 niðanfyri eru tær samanberingarnar, sum vórðu gjørdar fyri árini 2009-2024, nú gjørdar fyri 2019 til 2024, har støðisárið er sett til 2019.

**Ritmynd 6.3.** Samanbering av brúkarapristali fyri matvørur fyri útvald lond 2019-2024
Støðisár = 2019




*Kelda: Hagstova Føroya, Danmarks Statistik, Statistisk Sentralbyrå, Hagstofa Íslands, Statistisches Bundesamt, Statestikmyndigheten, Office for National Statistics, Kappingareftirlitið.*

Sum sæst á ritmynd 6.3, so er prísstigið í Noregi hækkað minst av øllum londum í samanberingini. Aftur eru tað londini Føroyar, Danmark og Noreg, sum hava lægstu príshækkingarnar. Í hesum londum eru prísirnir hækkaðir við millum 26% og 29%, meðan príshækkingarnar í Týsklandi, Stórabretlandi, Íslandi og Svøríki hava verið væl størri.

Samanumtikið kann sigast, at yvirhøvur er gongdin á føroyska brúkarapristalinum fyri matvørur næstan tann sama sum í flestu av londunum í samanberingini. Hetta er eisini galdandi fyri tíðarskeiðið frá byrjanini av koronufarsóttini og fram til í dag.

Var talan um innanlands viðurskifti, sum trýstu prísirnar so nógv upp, so skuldi føroyska brúkarapristalið fyri matvørur ikki havt somu gongd sum í okkara grannalondum.

Ein samanbering av brúkarapristølum fyri matvørur kann ikki avdúka, um føroyska matvøruvinnan hevur

**Kassi 4. Um lyklatølini**

**Ognarumferð= Nettosøla / Ogn tilsamans**

Vísir kapitaltillagingina hjá vinnuni. Ítøkiliga vísir ognarumferðin, hvussu stóra søluinntøku hvør ognarkróna skapar.

**Ognaravkast í % = Úrslit áðrenn rentur o.a. / Ogn tilsamans * 100**

Vísir, hvussu ein fyritøka megnar at skapa yvirskot í mun til, hvussu nógvur kapitalur er bundin í ognum.

**Rakstraravkast í % = Úrslit áðrenn rentur o.a. / (Nettosøla + Broyting í goymslu av liðugtvørum + Aðrar inntøkur) * 100**

Rakstraravkastið vísir vinningsføri hjá virkinum. Ítøkiliga vísir rakstraravkastið, hvussu stórur partur av søluinntøkuni er eftir sum vinningur, eftir at rakstrarkostnaðir eru drignir frá.

gjørt sær dælt av støðuni í sambandi tær mongu príshækkingarnar, sum hava verið. Sigast kann, at føroyska matvøruvinnan hevur fylgt teimum prísbroytingum, sum hava verið í okkara grannalondum. Men um hesar prísbroytingar hava verið rímiligar, ber ikki til at siga við støði í hesi grein, og hesin spurningur má tí standa ósvaraður í hesum umfari.

## 7. Lyklatøl fyri vinnugreinina

Um feløgini í føroysku gerandisvøruvinnuni hava økt sín vinning seinastu árini, kundu ábendingar verið um tað í roknskapunum hjá feløgunum.

Føroyska matvøruvinnan er fjøltáttað við fyritøkum, sum bæði eru virknar í heilsølu og smásølu, og har eru fyritøkur, ið bara hava virksemi í heil- ella smásølu.

### 7.1. Heilsøluliðið

Á ritmynd 7.1 niðanfyri sæst lyklatalið *Rakstraravkast* fyri føroyskar heilsølur, ið seldu gerandisvørur í tíðarskeiðinum 2009 til 2023.

Bláu stabbarnir er árliga rakstraravkastið, og ljósareyðu strikurnar er miðal fyri ávíst tíðarskeið.

**Ritmynd 7.1.** Rakstraravkast hjá føroyskum heilsølum árini 2001 til 2023




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Ritmyndin vísir greitt, at tíðarskeiðið 2001 til 2023 kann býtast sundur í trý styttri tíðarskeið. Fyrsta tíðarskeiðið er 2001 fram til umleið 2011, tá rakstraravkastið er óstøðugt og í miðal 2,77%. Annað tíðarskeiðið er 2012 til umleið 2015, tá rakstraravkastið fyri tað mesta er fallandi og í miðal 1,33%. Triðja og síðsta tíðarskeiðið er frá 2016 til 2023, tá rakstraravkastið er støðugt og í miðal 3,31%.

Rakstraravkastið hjá heilsøluliðnum er sostatt hækkað, men hetta hendi fyri tíggju árum síðani. Hækkingin frá næsta til triðja tíðarskeið kann tykjast stór, men sammet við fyrsta og longsta tíðarskeiðið er talan ikki um eina stóra hækking.

Á ritmynd 7.2 niðanfyri sæst *Ognaravkast* fyri føroyskar heilsølur, ið seldu gerandisvørur í tíðarskeiðinum 2001 til 2023.

Bláu stabbarnir er árliga ognaravkastið, og ljósareyða strikan er miðal fyri tíðarskeiðið.

**Ritmynd 7.2.** Ognaravkast hjá føroyskum heilsølum árini 2009 til 2023.




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Við støðið í somu tíðarskeiðum sum undir ritmynd 7.1. sæst, at gongdin bert partvís minnir um gongdina á rakstraravkastinum.

Ognaravkastið er rættiliga óstøðugt frá 2001 til 2011 og støðugt frá 2016 til 2023. Somuleiðis er eitt brádligt fall frá 2012 til 2015. Men miðal ognaravkastið frá 2001 til 2011 var 4,73%, og 4,26% frá 2016 til 2023. Sostatt er ognaravkastið fallið í tíðarskeiðinum. Tá rakstraravkastið hevur verið vaksandi, er sannlíkt, at onkur broyting er farin fram í ognunum.

Á ritmynd 7.3 niðanfyri sæst lyklatalið *Ognarumferð* fyri føroyskar heilsølur, ið seldu gerandisvørur í tíðarskeiðinum 2009 til 2023.

Bláu stabbarnir er árliga ognarumferðin, og ljósareyða strikan er miðal fyri tíðarskeiðið.

**Ritmynd 7.3.** Ognarumferð hjá heilsøluliðnum árini 2009-2023




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Sum sæst á teimum trimum tíðarskeiðunum, so fall ognarumferðin nógv í fyrsta tíðarskeiði, meðan hon í øðrum og triðja tiðarskeiði hevur verið støðug.

Tað, at ognarumferðin er fallin nógv, kann verða orsøk til, at ognaravkastið er fallið, samstundis sum rakstraravkastið er vaksið.

Ongin ábending er um, at heilsøluliðið hevur gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við koronufarsóttina og frameftir við tí fyrivarni, at ongi tøl fyriliggja fyri 2024.

### 7.2. Smásøluliðið

Á ritmynd 7.4 niðanfyri sæst lyklatalið *Rakstraravkast* fyri føroysku matvøruhandlarnar í tíðini 2001 til 2023. Grønu stabbarnir eru árliga rakstraravkastið, og ljósareyðu linjurnar eru miðal avkasti fyri ávíst tíðarskeið.

**Ritmynd 7.4.** Rakstraravkast fyri føroysku matvøruhandlarnar í tíðarskeiðinum 2009 til 2023.




*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Ritmynd 7.5.** Ognaravkast fyri matvøruhandlar í tíðarskeiðinum 2001-2023




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Rakstraravkastið fyri alt tíðarskeiðið frá 2001 til 2023 var 2,5%, men avkastið hevur verið óstøðugt. Árliga rakstraravkastið hevur sveiggjað millum -0,36% og 5,27%.

Á ritmyndini er miðal fyri somu tíðarskeið, sum vórðu brúkt í partinum um heilsøluliðið í talvu 7.1. Í fyrsta tíðarskeiðinum frá 2001 til 2011 er rakstraravkastið 2,5%, í øðrum tíðarskeiði er avkastið 2,09%, og í triðja tíðarskeiðinum er avkastið 2,73%. Yvirskipað er gongdin hin sama sum í heilsøluliðnum, har hægsta avkastið var í triðja tíðarskeiðinum, næsthægsta avkastið var í næsta tíðarskeiðinum, og lægsta avkastið í fyrsta tíðarskeiðinum.

Aftur sæst, at ongin ábending er um, at smásøluliðið hevur gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við koronufarsóttina og seinni. Í 2022 fellur avkastið niður á 1,3%, og árið eftir liggur tað á 2,48%, sum ikki er óvanligt.

Á ritmynd 7.5 niðanfyri sæst ognaravkastið fyri føroysku matvøruhandlarnar í tíðarskeiðinum 2001 til 2023. Grønu stabbarnir eru árliga ognaravkastið, og ljósareyðu strikurnar er miðal avkastið fyri ávíst tíðarskeið.

Sum sæst á stabbamyndini omanfyri var miðal ognaravkastið 6,3% fyri árini 2001 til 2023, men ognaravkastið sveiggjar millum -0,71% og 13,18%.

Ognaravkastið fyri smásøluliðið er øvugt av gongdini í heilsøluliðnum. Meðan gongdin í heilsøluliðnum var, at miðal avkastið var hægst í fyrsta tíðarskeiðinum og at avkastið var umleið tað sama tey næstu tíðarskeiðini, so er rakstraravkastið í smásøluliðnum umleið hitt sama fyrstu tvey tíðarskeiðini, meðan avkastið hækkar munandi í síðsta tíðarskeiði.

Um hugt verður eftir triðja tíðarskeiðinum sæst, at ognaravkastið fellir munandi millum 2020 og 2021, og í 2023 er tað framvegis undir miðal fyri tíðarskeiðið. Tølini fyri 2024 eru ikki tøk enn.

Á ritmynd 7.6 niðanfyri sæst ognarumferðin hjá føroyskum matvøruhandlum í tíðarskeiðinum 2001 til 2023. Grønu stabbarnir eru árliga ognarumferðin, meðan ljósareyðu linjurnar er miðal ognarumferðin fyri ávíst tíðarskeið.

**Ritmynd 7.6.** Ognarumferðin hjá føroyskum matvøruhandlum í tíðarskeiðinum 2001 til 2023




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Ognirnar fevna bæði um fíggjarligar ognir, støðisognir og ogn í umferð, og tí kann økt umferð stava frá øllum hesum ognarbólkum, umframt av øktari sølu.

Ognarumferðin hjá smásøluliðnum gongur øvugt av ognarumferðini hjá heilsøluliðnum. Ognarumferðin hjá smásøluliðnum hækkar líðandi, meðan ognarumferðin fyri heilsøluliðið lækkar líðandi.

Um økta umferðin stavar frá øktum umsetningi av vørum, so kann keldan til hetta vera, at umsetningurin er øktur lutfalsliga meira enn ognirnar. Ein onnur orsøk kann vera, at brúkarar eru farnir at keypa dýrari vørur. At enda kann vísast á, at handlarnir kunna hava skift sítt úrval av vørum til dýrari vørur. Tað er framvegis óvist, hví ognarumferðin hjá smásøluliðnum og heilsøluliðnum gongur øvugt av hvørjari aðrari.

Eingin ábending er um, at smásøluliðið hevur gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við koronufarsóttina og frameftir við tí fyrivarni, at ongi tøl fyriliggja fyri 2024.

## 8. Endaviðmerkingar

Greitt er, at príshækkingarnar seinastu sløku trý árini hava verið óvanliga stórar søguliga sæð. Í árunum frammanundan øktist tøka inntøkan ár undan ári, samstundis sum næstan ongin prísvøkstur var.

Somuleiðis er greitt, at fyri føroyska brúkaran hava príshækkingarnar seinastu árini verið ein veruligur smeitur, tí brúkarin hevur mist ein stóran part av tí øking, sum hevur verið av tøku inntøkuni síðani 2009.

Samanberingar millum føroyska brúkaraprístalið fyri matvørur og somu prístøl í okkara grannalondum vísa, at føroyska prísstigið fylgir gongdini í okkara grannalondum. Sostatt bendir hetta á, at orsøkin til príshækkingarnar seinastu sløku trý árini skal finnast uttan fyri landoddarnar. Tað skal tó viðmerkjast, at ein samanbering av prístølum er ikki eitt nógv neyvt amboð til beinleiðis at kunna gera niðurstøðu um, um føroyska handilsvinnan hevur ella ikki hevur gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við príshækkingarnar, sum hava verið.

Í tíðarskeiðinum 2009 til 2022 eru ábendingar um, at nýtslan hjá brúkarunum økist, annaðhvørt tí fleiri vørur verða keyptar, ella tí dýrari vørur verða keyptar.

Um tað er eftirspurningurin eftir matvørum, sum er broyttur, ella um tað er útboðið av matvørum, sum er broytt, má standa ósvarað í hesi grein, tí almenn hagtøl eru ikki, sum kunna varpa ljós á hetta.

Rakstraravkastið fyri bæði heil- og smásøluliðið er hækkað seinastu árini, men ikki í sambandi við koronufarsóttina. Rakstraravkastið fall munandi í 2022, tá koronufarsóttin gekk.

Gongdin í ognaravkastinum fyri heilsøluliðið er fallandi, meðan ognaravkastið fyri smásøluliðið er vaksið seinastu árini. Ein møgulig orsøk kann vera, at ognarumferðin hevur verið fallandi fyri heilsøluliðið, meðan ognarumferðin fyri smásøluliðið er vaksin. Hvat orsøkin er til hetta, er óvíst, og tað er somuleiðis óvist, hví ognarumferðin í heilsølu og smásølu tykjast hava øvugta gongd.

Samanumtikið eru ongar ábendingar um, at heil- ella smásøluliðið hava gjørt sær dælt av støðuni í sambandi við koronufarsóttina og frameftir.

Hóast hetta, so er tað ein veruleiki, at prísirnir eru hækkaðir nógv seinastu árini við tí avleiðing, at brúkarin er undir trýsti. Á einum marknaði við fáum veitarum vil marknaðarbygnaðurin ofta hava við sær, at brúkarin kemur at bera allar prísstoytir.

Kappingareftirlitið metir, at tað er neyðugt at gera eina størri kanning, tí marknaðurin fyri húsarhaldsvørur hevur ómetaliga stóran týdning fyri brúkaran, umframt at mangir ósvaraðir spurningar eru. Kanningin eigur at fevna um veitarar, heilsølur og smásølur, har týðandi viðurskifti fyri kappingina verða kortløgd.

Endamálið er at fáa staðfest, um forðingar eru fyri virknari kapping á marknaðinum. Kappingareftirlitið metir, at størst gagn fæst burtur úr slíkari kanning, um hon ikki verður afturlítandi, men hevur støðuna nú og frameftir í huga.

Í ár fer Kappingareftirlitið tí undir at savna upplýsingar inn og viðgera tær við tí endamáli at fáa eina størri kanning av marknaðinum fyri húsarhaldsvørur, sum skal almannakunngerast í síni heild í 2027.

Men ætlanin er, at almenningurin verður kunnaður um niðurstøður í kanningini, so hvørt tær verða gjørdar í tíðarskeiðinum fram til 2027.